# Fær onga undirtøku

**Fólkatingslimurin hjá Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen er sannførd um, at Dansk Folkeparti fær ongan stuðul í donsku stjórnini fyri sínum ætlaninum at skerja heildarveitingina. -Hatta má standa fyri teirra egnu rokning, sigur Lisbeth L. Petersen**

HEILDARVEITINGIN SKERJAST
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

- Hatta fáa teir onga undirtøku fyri.

Eins og Høgni Hoydal hevur Lisbeth L. Petersen torført við at taka ætlanirnar hjá Dansk Folkeparti í álvara. Hon er sannførd um, at Dansk Folkeparti fær ongan stuðul í donsku stjórnini um teir ætla at skerja blokkin.

- Útsøgnin hjá Kristian Thulesen Dahl kom í meldrinum av ráðstevnuni um heildarveitingina, og satt at siga skilti eg ongantíð hansara útsøgn. Síðan ráðstevnuna er nógv nýtt framkomið um heildarveitingina, og hugburðurin hjá stjórnini er, at teir ikki ynskja eina skerjing av heildarveitingini. Hatta má tí standa fyri teirra egnu rokning, vísir Lisbeth L. Petersen á.

Hon sigur, at heildarveitingin er ein samráðingarspurningur millum stjórnina og landsstýrið. Heildarveitingin er fastfryst til 2006, og tað kann Dansk Folkeparti ikki gera stórvegis við, sigur fólkatingslimurin.



*Fólkatingslimurin hjá Sambandsflokkinum, Lisbeth L. Petersen, sigur, at Dansk Folkeparti fær ongan stuðul í stjórnini fyri sínum ætlaninum at skerja heildarveitingina.*
*Mynd: Savnsmynd*

# Dansk Folkeparti heldur fast

**Dansk Folkeparti heldur framvegis fast um, at danska heildarveitingin til Føroya verður eitt av málunum, sum Dansk Folkeparti vil umrøða í samband við fíggjarlógarsamráðingarnar við donsku stjórnina komandi vikurnar**

HEILDARVEITING SKERJAST
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*-Eg las í bløðunum í farnu viku, at tit aftur ótálmað eru farnir undir at byggja glæsiligar tunlar, og eg kann tí als ikki útihýsa møguleikanum fyri, at vit í samráðingum við stjórnina fara at umrøða eina møguliga skerjing av heildarveitingini, vísir Per Dahlgaard á, fólkatingslimurin hjá Danske Folkeparti.*
*Mynd: www. danskfolkeparti.dk*

Hóttanirnar hjá formanninum í donsku fíggjarnevndini, Kristian Thulesen Dahl, um skerjingina av heildarveitingini vóru ikki bara tóm orð.

Í kjalarvørrinum av kjakinum um føroyska fiskimannafrádráttin í donsku fjølmiðlunum í summar segði Kristian Thulesen Dahl, ið umboðar Dansk Folkeparti í Fólkatinginum, at hann vildi virka fyri, at danska heildarveitingin skuldi verða ein týðandi partur av fíggjarlógarsamráðingunum við stjórnina í heyst.

Dansk Folkeparti fer eftir øllum at døma at gera álvara av hesum ætlaninum.

- Eg ivist stórliga um danski borgarin vil góðtaka, at tit fáa eina árliga heildarveiting úr Danmark, sum tit ikki hava brúk fyri, tí tað er jú ein sannroynd, at stórur partur av heildarveitingini verður nýtt til at fíggja eitt lægri skattatrýst enn vit hava í Danmark, sigur 60 ára gamli fólkatingslimurin hjá Dansk Folkeparti, Per Dahlgaard, ið eisini er limur í fíggjarnevndini.

Framsøgumaðurin hjá Dansk Folkeparti í fíggjarmálum er vanliga Kristian Thulesen Dahl, men hesin er júst blivin pápi, og verður burturstaddur komandi dagarnar. Hin limurin í fíggjarnevndini hjá Dansk Folkeparti, Per Dahlgaard, er tí framsøgumaður hjá flokkinum komandi dagarnar.

- Eg las í bløðunum í farnu viku, at tit aftur ótálmað eru farnir undir at byggja glæsiligar tunlar, og eg kann tí als ikki útihýsa møguleikanum fyri, at vit í samráðingum við stjórnina fara at umrøða eina møguliga skerjing av heildarveitingini, vísir Per Dahlgaard á.

Í farnu viku almannakunngjørdi VK-stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen fíggjarlógaruppskotið fyri 2005, og í næstum fer stjórnin at tingast við hinar flokkarnar í Fólkatinginum um uppskotið.

## Keypa atkvøður

Spurdur, um Dansk Folkeparti væntar at fáa politiskan stuðul í Fólkatinginum fyri eini møguligari skerjing av heildarveitingini til Føroya, svarar Per Dahlgaard avgjørdur nei.

- Eg kann hvørki ímynda mær, at Venstre ella Javnaðarflokkurin vilja skerja heildarveitingina. Stendur tað til hesar flokkar, verður heildarveitingin helst økt, so flokkarnir kunnu vinna nakrar norðuratlantiskar atkvøður til komandi val. Vit hava jú dømi um, at Nyrup keypti seg til hvítusunnupakkan á sinni við at lata føroyingum eina hægri heildarveiting, sigur Per Dahlgaard.

*Tá tit kortini ikki vænta at fáa politiskan stuðul fyri eini skerjing av heildarveitingini, eru ætlanirnar hjá tykkum ikki bert við til at elva til klandur í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark við?*

Nei tað vil eg ikki siga. Eg ivist ikki í føroyingar eru skilagóðir, og skilja, at vit kunnu also ikki lata eina árliga heildarveiting, sum verður nýtt til eitt lægri skattatrýst í Føroyum. Vit mugu jú hava fair play, vísir Per Dahlgaard á.

*Heldur Dansk Folkeparti at ríkisfelagsskapurin skal varðveitast?*

Dansk Folkeparti vil gjarna varðveita ríkisfelagsskapin. Ynskja føroyingar hinvegin at sleppa úr ríkisfelagsskapinum, standa vit teimum ikki í vegin. Velja tit at fara úr Ríkisfelagsskapinum, so sigur tað seg sjálvt, at tit mugu klára tykkum uttan heildarveitingina, sigur Per Dahlgaard at enda.

# Tómt tos

**Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum og fólkatingsmaðurin, Høgni Hoydal, tekur ikki ætlanirnar hjá Dansk Folkeparti í álvara.**

HEILDARVEITING SKERJAST
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Populistisk. Pressushow. Tómt tos. Fjas.

Tað skortar ikki við nei-ligum orðum, tá fólkatingslimurin, Høgni Hoydal verður spurdur, hvat hann heldur um ætlanirnar hjá Dansk Folkeparti at skerja heildarvetingina til Føroya.

- Hatta hava teir sagt fyrr. Skal heildarveitingin skerjast skal átakið koma úr Føroyum. Dansk Folkeparti er ein populistiskur flokkur, og livir av slíkum útsøgnum, og eg kann snøgt sagt ikki taka tað í álvara, sigur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum.

Hann vísir á, at danska stjórnin og føroyska landsstýrið hava gjørt eina avtalu um, at blokkurin er fastfrystur til 2006, og tí ber ikki til hjá Dansk Folkeparti at trýsta stjórnina til at skerja heildarveitingina í samband við fíggjarlógarsamráðingarnar.

Formaður í donsku fíggjarnevndini er fólkatingslimurin hjá Dansk Folkeparti, Kristian Thulesen Dahl, og siðvenja er fyri, at fíggjarnevndin hevur ein týðandi leiklut í samband við fíggjarlógar uppskot, men Høgni Hoydal ber ongan ótta fyri, at Kristian Thulesen Dahl kann nýta sína formansess til at sannføra stjórnina um at skerja heildarveitingina.

- Nei tað beri eg ongan ótta fyri. Ein fólkatingsnevnd hevur ikki heimild til at ógylda eina avtalu, sum danska stjórnin og føroyska landsstýrið hevur gjørt. Spyrt tú meg, er talan ikki um annað enn eitt pressushow frá Dansk Folkeparti, sigur Høgni Hoydal.



# Gjáargarður skift eigara




*Atlantsflog, Greengate Incoming, Framtaksgrunnurin og Eirik Suni Danielsen hava í felag keypt Gjáargarð*

**Eirik Suni Danielsen hevur saman við trimum øðrum pørtum keypt gistingarhúsið Gjáargarður. Hann sær nógvar møguleikar við húsinum, og verður farið í gongd við at gera tað klárt til komandi summar alt fyri eitt**

KEYP
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Atlantsflog, Greengate Incoming og Framtaksgrunnurin hava saman við Eirki Suna Danielsen keypt Gjáargarð, sum hevur staðið til sølu síðani í apríl. Felagið eitur PF Gjáargarður, og keypið kom endaliga í lag í vikuskiftinum.

Tá Eirik Suni sá lýsingina í apríl, byrjaði hann at spæla sær við tankan um, at tað kundi verðið spennandi at rikið gistingarhúsið við Gjógv.

– Tað koma so ótrúliga nógv fólk norður til Gjáar, so hetta eri eg sera spentur uppá, sigur hann.

Hann viðgongur, at hetta kann tykjast sum ein løgin tíð at keypa eitt gistingarhús, nú ferðafólkaárstíðin júst er farin framvið. Men samstundis er hetta í hansara ferð byrjanin til fyrireikingarnar til komandi summar.

## Fleiri møguleikar

Eirik Suni greiðir frá, at fyri fyrst er ætlanin, at gistingarhúsið skal verða opið frá 1. juni til 1. september fyri ferðafólkum, sum ynskja antin at gista á vallaraheimi, gistingarhúsi ella á tjaldplássi.

Um heystið og várið sær hann so fyri sær, at húsið kann verða leigað út til ymisk tiltøk. Alt frá skeiðsvirksemi til evnisvikur.

– Eisini ber væl til at leiga húsið til smærri veitslur, til dømis er tað væl egnað til eitt brúdleyp, sum kanska ikki er so stórt, sigur hann.

Uppi á loftinum er eitt høli, har umleið 80 fólk fáa sitið til borðs, og tað heldur hann, kundi verðið sera hóskandi til eina minni veitslu av onkrum slagi.

## Matgerð

Á Gjáargarði hava fólk fingið morgunmat, men annars hevur tað ikki borið til at fingið annan mat. Hetta ætlar Eirik Suni at broyta. Køkurin í húsinum verður broyttur til ein ídnaðarkøk, sum tað verður kallað. So er ætlanin at bæði fólk, ið gista og tey, ið koma til bygdina á vitjan ein dag, skulu kunna støkka inn á gólvið í Gjáargarði og fáa ein góðan bita.

– Vit fara at satsa uppá eisini at fáa fólk, sum koma her við bussum, at koma inn á gólvið til eina máltíð av onkrum slagi, sigur Eirik Suni.

## Ístandgerð

Ætlanir eru at gera nøkur kømur í stand. Hetta fyri at hækka støðið. Kømurni á fyrstu hædd hava øll wc og bað, men Eirik Suni vil hækka støðið nakað meira, so at eisini fólk, ið vilja búgva eitt sindur betur, kunnu fáa eitt tilboð á Gjáargarði.

– Vit fara allarfyrst í gongd við at gera tað í stand, sum skal gerast. Eitt nú køkurin, kømurni og sjálvandi skulu hentleikarnir til skeiðsvirksemi eisini gerast í topp, greiðir Eirik Suni frá. Og leggur spentur á málinum afturat, at nú er bara at bróta upp um armar. Hann fegnast stórliga um, at ein ætlan, sum hann hevur arbeitt við síðani í apríl, nú er vorðin veruleiki.

Eirik Suni fer sjálvur at reka gistingarhúsið. Íløgan í alt, tað vil siga við ístandgerð og øllum, liggur um 4,3 milliónir krónur.

Gjáargarður verður opin fyri øllum áhugaðum mikudagin frá klokkan 16 til 20.

# 24 springarar løgdu beinini í Gøtu

SPRINGARAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin vórðu 24 springarar hildnir til og dripnir á sandinum í Syðrugøtu, sum er góðkend hvalvág.

Kristian Martin Joensen, sýslumaður í Eysturoy, sigur, at rakstur og dráp vórðu skipað í samráð millum hann og grindaformannin.

Hann sigur, at springararnir vórðu funnir á Gøtuvík klokkan 11.40, men teir vórðu mistir burtur aftur. Seinni vórðu teir funnir aftur innanvert Gøtunes.

– Drápið byrjaði klokkan 13.10 og var liðugt longu seks minuttir seinni – ella klokkan 13.16.

Sýslumaðurin sigur, at hóast springararnir ikki gjørdu landgongd, gekk drápið bæði skjótt og væl.

Kristian Martin Joensen sigur, at springararnir vórðu býttir í 82 drápspartar.



*24 springarar vórðu hildnir til í Syðrugøtu leygardagin*
*Mynd: Hjørdis Gregersen*

# Gásamordarin

Vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík sigur, at fríggjakvøldið klokkan hálvgum átta hendi eitt nakað undarligt ferðsluóhapp. Ein bilur sneiddi av ímóti Oyndarfirði, og hesin møtir einum gásaflokki, sum hann heldur av fyri. Áðrenn hann veit av kemur ein lítil reyður bilur við miklari ferð frá Oyndarfirði.

– Hann koyrir inn í flokkin, og tvær gæs máttu lata lív. Hann rymir frá staðnum, tíverri, sigur vakthavandi.

Løgreglan veit enn ikki at siga, hvør koyrdi tann lítla reyða bilin, ella hvør nummarplátan er.

## Friðarligt í Havnini

Sagt verður frá einum lutvíst friðarligum vikuskiftið í Havnini. Ein fráboðan varð um harðskap fríggjakvøldið, tá tveir mans fóru til hendurs mitt í býnum.

Leygarmorgunin vórðu fimm fólk tikin inn fyri at sova rúsin av sær. Leygarkvøldið var friðarligt. Tað kom tó ein hóttan um sjálvmorðsroynd

Boðað varð frá grind í Kvívík sunnudagin, tá onkur helt seg síggja ein grindaflokk við vágatunnilsmunnan vágoyarmegin. Men har var bert roykur, ongin grind, sum tikið varð til.

Tá stóð betur til í Eysturoynni. Fýra og tjúgu springarar vórðu hildnir til í Syðrugøtu leygardagin. Býtt varð í 82 drápspartar.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

